Gingið væl hjá Summarfestivalinum

Kostnaðurin av atgongumerkjum til Sumarfestivalin fór upp í fyrradagin, og vit hava í hesum sambandi tikið eitt prát við Steintór Rasmussen um, hvussu tað hevur gingist við atgongumerkjasøluni.

Steintór letur bara heilt væl at søluni av atgongumerkjum, sum byrjaði áðrenn jól.

- Vit valdu at byrja við atgongumerkjasøluni longu áðrenn jól, og hetta var væl fyrr enn til síðsta Summarfestival. Áðrenn jól fingu fólk eitt serligt tilboð, har tey kundu keypa atgongumerki fyri 495 kr., men frá 1. januar fór prísurin upp.

- Vit hava annars havt eina rættiliga støðuga sølu av atgongumerkjum í ár, men tá tað byrjar at nærkast eini freist, har kostnaðurin av atgongumerkjum fer upp, merkja vit eina stóra hækking í søluni, sigur Steintór Rasmussen.

Hann leggur afturat, at Summarfestivalurin hevur selt fleiri atgongumerki í ár, enn teir høvdu gjørt um sama mundið í fjør.

Summarfestivalurin hevur longu kunngjørt fleiri stór nøvn, sum skulu spæla á festivalinum í ár. Av teimum útlendsku nøvnunum kunnu nevnast Kim Wilde, Bryan Rice og heimskendi rockbólkurin, Scorpions, og hetta eru alt nøvn, sum skuldu drigið nógvar áhoyrarar.

- Í fjør høvdu vit slakar 10.000 gestir á Summarfestivalinum. Vit hava tó nakrar sera góðar bólkar á festivalinum í ár, so vit vóna at fáa enn fleiri gestir, sigur Steintór at enda.

Scorpions

Ferðast í Vágum & Mykinesi
2007
Vága Kunningarstova
Tel 333455 www.vagar.fo

PhotoCare
Vit taka okkum m.a. av
- passmyndum
- digitalum myndum
- allari myndaviðgerð
- sølu av digitalum myndatólum
- sølu av DVD video upptøkutólum
31 7 9 13
Dr. Jakobsensg. 12
FO-100 Tórshavn
njac@kallnet.fo

Blómuhandilin Summardáin
N. Pálsg. 16, Klaksvík
Tlf 456193 • Fax 457193

FRÍ Í FØROYUM 2007
Halt frí tá tú hevur frí
SamVit
Vilji Vitan Vekstur

WWW.VESTMANNABJORGINI.COM
TEL 471600
SJÓFERÐIR

NILAN: Ventilatións-verk við innbygdari hitapumpu
TRYGGJAR GOTT INNIKLIMA VIÐ AT:
- Tryggja støðuga útskifting av luftini
- Hita frísku luftina, sum verður blást inn
- Avfukta og endurvinnur hitan í inniluftini
- Avmarka ovurviðkvæmið
Verður uppsett av góðkendum montøri
Reno-Vent Sp/f
Telefon 47 81 70

PITSA & PITA
HEIMKOYRING
hvonn
BRASSERIE
Tel 35 00 35 · hvonn@hvonn.fo · www.hvonn.fo